

# TAKK **HANUS**

ELSKANDI, GRÁTANDI, PRÍSANDI OG REVSANDI Í FEITA DJEVULSBESETTA **POUL F. ANDANUM**. NÝÍLATNAR YRKINGAR EFTIR POUL F. VÓRÐU BEISTALIGA VÆL FRAMFØRDAR AV **ÜBERTULKARANUM HANUS G.** Í SJÓNLEIKARHÚSINUM HERFYRI





**TÓNLEIKUR**

Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Ganga Eros og Baccus saman, verður stór list. So segði Hargaskaldið Poul F.

Og helst hevði hann rætt í tí.

Men ganga Poul F. og Hanus G. saman, hendir eisini stór list. Tað fingu vit, sum vóru so heppin at vera áhoyrarar í Sjónleikarhúsinum hóskvøldið at sanna. Tað er annars ein løta síðani vit seinast hoyrdu nýtt frá Hanusi. Hann, sum hevur smíðjað løg til so nógvar av yrkingunum hjá Poul F.

Orð og løg, sum hava ríkað okkum løtur og lívgað okkum røtur.

Endamálið við konsertini var ikki, sum vit eru von við, at promovera eina nýggja útgávu. Nei, Hanus er á reyvini, tí hann hevur onga inntøku havt í ár. So Jónas Block kom vinmanninum til hjálpar og stáplaði eftir ongari tíð eina konsertrøð á beinini. Og tað kunnu bæði Hanus og vit takka fyri. Hanus, tí hann fekk pengar at keypa breyð fyri, og vit onnur, tí Hanus lyftir eina týðandi public-service uppgávu við at fólksliggera hendan týðandi skaldararv.

Tí kundu vit seta okkum aftur á og njóta nakrar av gimsteinunum úr rúgvunum av yrkingum, sum Hanus seinastu árini hevur sitið og klimtrað til. Frammanundan kendu vit bara eini 20 av teimum áleið 70 sangunum úr rúgvuni í pappeskjuni á loftinum hjá lagasmiðinum. Har liggja tey, tí Hanus meir og minni livir í einari pappeskju. Ein tilvera sum hann, sambært honum sjálvum, er reyvtroyttur av.

Men uppi av endabalkongini, sum hevur lagt setur til mangt eitt ungdómsfríggj, fingu vit at sanna, at dugur framvegis er í Hanus. Hann er ikki typan, sum brýtur upp úr nýggjum í heilum. Hann hevur sítt egna ljóð og sín persónliga stíl. So hóast løgini vóru nýggj fyri okkara oyru, var stílurin hin sami fólkatónleikarakendi, beistaktigi og melankolski, sum vit minnast frá hinum báðum føroysku útgávunum, »Til gaman og álvara« og »Bouquet«.

Fá munnu, sum Hanus G., hava gávurnar at geva yrkingunum eftir Poul F. sál, so tær standa eftir sum djúpir, logandi brandar, frelsandi himnaferðir ella rámandi sannleikar. Um móðurlandið, fedranna mál, sorgblíðan kærleika, deyðan, fjandan og ógudligheit annars.

Eymliga ballar hann orðamyndirnar í tónaham. Viðhvørt í meditativum mol. Aðratíðir í dundrandi dur. Við flúgvandi løttum fingraspæli og einari rødd sum dunið undan Beinisvørð.

Takk Hanus.

Ljóðførisekvilibristarnir, Mikeal Blak og Magnus Johannesen. Takk fyri, at tit, í cognaclittu glamuni frá kertuljósinum, so meistarliga akkompagneraðu Hanus G. við sjáldsama nemandi ljóðførum sum xylofon, pumpuorgul og kontrabass. Tað riggaði.

Og Hanus. Rangluttir og klaksvíksligur, í puntuttari skógmansskjúrtu og jesushári. Takk fyri, at tú leggur nýggj løg til gamlar, útforsjabbaðar slagarar »Fagra blóma« og »Tú dregur meg sum ein magnetur«. Vakrar yrkingar, sum hava betri uppiborið enn at vera tannsteytarasangir millum suppu, steik og ís.

Í Sjónleikarhúsinum. Hesum hjartarúminum, sum við einum dámi av parisiskum boheme leggur pall og karmar til so mangar góðar upplivingar hjá menniskjunum í Havn. »Til gaman og álvara«. Orðini, ið so sigandi hava trónað yvir replikkum, projektørum og dansiringum í eina lítla øld. Hugaligt at vita sær, at júst sami setningur eisini var heitið á fyrsta yrkingarsavninum hjá Poul F. eins og á fyrstu plátuútgávuni hjá troubadurinum, Hanus G.: Til gaman og álvara.

Skeg.

Góði Hanus. Kanst tú ikki skunda tær at geva ein fløgu út?